Dagf. 16. januar 2026
HMR j. nr. 26/00177-8

Margit Stórá
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-064/2025 eftir § 52a í tingskipanini um viðgerðartrygd, lággáttartilboð og avrúsing á Landssjúkrahúsinum, frá Kristionnu Winther Poulsen, løgtingskvinnu.

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Metir landsstýriskvinnan, at viðgerðartrygd fyri rúsevnamisnýtarar kann setast í verk?
2. Um ja, hvussu kann ein slík viðgerðartrygd skipast?
3. Metir landsstýriskvinnan, at tørvur er á einum lággáttartilboði til rúsevnaviðgerð?
4. Um ja, hvussu kann eitt slíkt lággáttartilboð skipast?
5. Hvat skal til fyri at skipa eitt tilboð á Landssjúkrahúsinum, har rúsevnamisnýtarar kunnu koma til avrúsingar?

Svar:

Til spurning 1 og 2

Tann viðgerðartrygd, sum partvíst er sett í verk í almenna heilsugeiranum í okkara grannalondum, er skipað soleiðis, at tað verður ásett ein ávíst tíðarfreist í mun til, at tað almenna skal veita kanning og viðgerð. Um viðgerðarstaðið, sum borgarin er ávístur til, ikki megnar at veita tilboðið innan freistina, hevur borgarin rætt til at velja eitt annað viðgerðarstað, ið sum oftast er í privata geiranum.

Í dag eru tað sjálvsognarstovnarnir Frælsi, Heilbrigdi og Blákrossheimið, sum veita viðgerð fyri bundinskap av rúsdrekka og rúsevnum. Viðgerðarstovnarnir fáa játtan á fíggjarlógini, og er virksemið skipað í viðtøkum og reglugerðum við avvarðandi stjórnarráð og í samsvari við viðkomandi lóggávu á økinum.

Spurningurin er, hvussu ein viðgerðartrygd kann virka í sambandi við rúsdrekka- og rúsevnaviðgerð. Um tað verður ásett ein viðgerðartrygd, og hesir viðgerðarstovnar ikki megna at halda freistina, er avbjóðingin hvar borgarin, sum er bundin av rúsdrekka og rúsevnum, so skal fara. Skal borgarin hava rætt til at velja viðgerð á einum viðgerðarstað uttanlands, sum tað almenna skal gjalda, ella skal tað almenna við eini viðgerðartrygd gjalda til møguligar parallellar privatar skipanir, sum verða bygdar upp, og sum væntandi koma at kappast um verandi starvsfólk innan viðgerðarøkið.

Eg meti ikki, at ein viðgerðartrygd fyri fólk, sum eru bundin av rúsdrekka og rúsevnum, er ein gongd leið í Føroyum. Í staðin eiga vit at skipa viðgerðartilboðini øðrvísi í Føroyum og í samsvari við eitt av málunum í samgonguskjalinum:

"Fólk, sum eru komin út í bundinskap av rúsdrekka og rúsevnum, skulu hava viðkomandi tvørfakliga viðgerð og hjálp sum skjótast. Vit skulu hava eitt meira fjøltáttað tilboð við ambulantari viðgerð".

Í hesum sambandi havi eg biðið um eina lýsing av verandi viðgerðartilboðnum fyri at staðfesta, hvørt tørvur er á fleiri ambulantum tilboðum, og um verandi viðgerðarstovnar veita neyðugu viðgerðina. Hendan lýsing er um at vera liðug og fer at verða viðgjørd í næstum.

Ein annar trupulleiki í sambandi við rúsdrekka- og rúsevnaviðgerð varð m.a. tikin upp í álitinum "Endurskoðan av RÓWT og tænastum til ung við samansettum og umfatandi sálarligum, sosialum og rúsevnistrupulleikum", sum ein tvørfakligur arbeiðsbólkur handaði avvarðandi landsstýrisfólkum í juni í fjør. Álitið vísti m.a. á avbjóðingina við, at fólk við dupultdiagnosum detta niður millum skipanirnar.

Í samsvari við álitið verður í løtuni arbeitt við at seta enn ein tvørfakligan bólk, sum skal lýsa, hvussu eitt rúsviðgerðartilboð, ið rúmar fólki við dupultdiagnosum, skal skipast. Herundir lýsing av innihaldi, fakligum førleikum hjá starvsfólkum og kostnaði. Harumframt um eitt av verandi viðgerðarstøðum kann víðkast ella umskipast til endamálið, ella um avrúsing og rúsviðgerð til málbólkin skal skipast á annan hátt.

Til spurning 3 og 4

Spurningurin er, hvat liggur í hugtakinum "lággáttartilboð", tá ið tað viðvíkur rúsdrekka- og rúsevnaviðgerð. Eg meti ikki, at tað er rætt at ganga uppá kompromis við fakligu dygdina, fyri at tað skal verða lættari at fáa viðgerð og fleiri skulu koma ígjøgnum skipanina. Til dømis eigur ein avrúsing altíð at verða gjørd undir læknaligari ábyrgd.

Í samsvari við tilmælið í áðurnevnda álitinum um RÓWT, verður eitt tilhaldsstað (lágáttartilboð) skipað undir Almanna- og heilsumálaráðnum, sum letur upp í fyrru hálvu av hesum árinum. Rúsviðgerðarstovnarnir fara at hava ein leiklut í nýggja tilhaldsstaðnum við at veita samrøður og fakliga vegleiðing til ung við rúsavbjóðingum, og við at luttaka í tvørfakliga samstarvinum á

staðnum. Hetta við tí fyri eygað at styrkja samanhangin millum stuðul, fyribyrging og viðgerð, og gera tað lættari hjá teimum ungu at taka stig til víðari rúsevnisviðgerð, tá tey eru klár.

Eg meti í hesum sambandi, at tað hevur týdning, at vit skipa okkum soleiðis, at flest møgulig fólk, ið eru bundin av rúsdrekka og rúsevnum, verða loftaði, tá ið tey eru motiveraði at fara í viðgerð, og at tað í størst møguligan mun verður fyribyrgt, at fólk detta niður millum skipanirnar. Sum áður nevnt er eitt arbeiði í gongd við at lýsa og viðgera, um verandi tilboð á økinum eru nøktandi, samstundis sum farið verður undir eitt arbeiði, sum skal lýsa, hvussu eitt rúsviðgerðartilboð, ið rúmar fólki við dupultdiagnosum, skal skipast.

Til spurning 5

Sambært Sjúkrahúsverkinum er tað vorðið ein siðvenja, at sjúklingar verða innlagdir á Medisinska depilin ella Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, tá ið tørvur er á abstinensviðgerð í sambandi við avrúsing. Tílík abstinensviðgerð tekur 1-4 dagar. Eftir hetta má víðari viðgerð móti rúsdrekka- ella rúsevnamisnýtslu verða veitt í øðrum høpi, um tørvur er á tí, ella sjúklingurin ynskir tað.

Sjúklingar fáa sostatt abstinensviðgerð á Landssjúkrahúsinum sum er, men talan er bert um abstinensviðgerð, sum liður í avrúsing, og ikki eitt samla generelt tilboð um avrúsing.

Sambært Sjúkrahúsverkinum kundi tað verið skilagott at sett í verk eitt tilboð um avrúsing í Sjúkrahúsverkinum, men hetta hevði verið eitt nýtt tilboð, sum bæði krevur at starvsfólk ogna sær førleikar til at veita hesa viðgerð og egnaðar fysiskar karmar til eitt tílíkt tilboð. Sambært hagtølum hjá Landssjúkrahúsinum hava bæði medisinsku seingjardeildirnar og psykiatrisku seingjardeildirnar ein sera høgan belegning, ofta yvir 100 prosent. Tí ber tað ikki til at skipa eitt nýtt tilboð innanfyri verandi karmar, uttan at niðurlaga okkurt annað av viðgerðartilboðunum.

Almanna- og heilsumálaráðið, 16. januar 2026

Margit Stóra
landsstýriskvinna